UTTAN ÚR HEIMI

## Rumsfeld stúrin

Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, segði seg í gjár stúra fyri teirri stóru kinesisku vápnadubbingini, sum hann segði vera serliga óhepna, tí hon fer fram í tí dulda.

Rumsfeld, sum er á vitjan í Kina, segði í einari røðu á einum politiskum skúla í Beijing, at umheimurin vil fegin samstarva við eitt friðarligt Kina, men at verandi gongd elvir til trupulleikar á summum økjum. Eygleiðarar ivast ikki í, at hann við hesum sipaði til Taiwan uttan at nevna landið við navni.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Rumsfeld kærir seg um ta kinesisku vápnadubbingina. Hann vil vera við, at teir kinesisku myndugleikarnir brúka nógv meiri pengar til vápn og ymsa hernaðarútgerð, enn teir siga alment. Sambært amerikanska verjumálaráðnum brúkar Kina ímillum 500 og 600 milliardir krónur um árið til verjuna, og ein stórur partur fer til rakettir, stríðsflogfør, herskip og kavbátar, sigur Pentagon. Tann kinesiska dubbingin fer at hava við sær, at um fá ár verður Kina størsta hernaðarveldið í Asia og Kyrrahavsøkinum.

## Meiri olja frá OPEC

Felagsskapurin hjá oljuútflytaralondunum, OPEC, er til reiðar at økja framleiðsluna mundandi tey næstu árini.

Á einum fundi við suðurkoreanska handilsmálaráðharran í gjár segði aðalskrivarin í OPEC, Adnan Shihab-Eldin, at tey næstu fimm árini fara OPEC-londini at økja oljuframleiðsluna 5,5 milliónir tunnur um dagin.

Verður ætlanin fullførd, ber tað at bera í sær, at oljuframleiðslan hjá OPEC-londunum verður økt úr 32,5 í 38 milliónir tunnur um dagin næstu fimm árini.

## Sjúkur fuglur í Noregi

Í seinastuni hava norsku djóraverndarmyndugleikarnir tikið royndir av umleið hundrað villdunnum frá byrsumonnum í Rogalandi og Østfold, og nú verður kannað, um tær vóru sjúkar.

Sambært landúnaðar- og matvørumálaráðnum hava royndirnar longu víst, at tíggju av dunnunum vóru smittaðar við einum virusi, men myndugleikarnir leggja dent á, at talan er ikki um ta herviliga fuglakrímið. Teir hava tí boðað byrsumonnunum frá, at tað er eingin vandi fyri, at teir kunnu verða smittaðir av villdunnunum, og tað er heldur eingin vandi fyri, at villdunnurnar smitta annan fugl.

Terje Riis-Johansen, sum júst hevur tikið við sum landbúnaðar- og matvørumálaráðharri, er sera fegin um, at byrsumenninir eru til reiðar at hjálpa myndugleikunum at kanna møguligar sjúkur hjá norskum fugli, skrivar Nordlys.

## Vænta rentuhækking

Nýggj hagtøl vísa, at í september var inflasjónin í evrulondunum størri, enn hon hevur verið tey seinastu trý árini og væl størri enn tað, sum Evropeiski Miðbankin hevði roknað við.

Tey nýggju tølini hava fingið búskaparfrøðingar at gita, at miðbankin fer at hækka rentuna. Rob Carnell í ING Bank sigur við Reuters, at tað er kanska ikki neyðugt hjá miðbankanum at hækka rentuna í hesum árinum, men at rentan helst fer at hækka í fyrsta ella øðrum ársfjórðingi næsta ár. Hækkar rentan í evrulondunum, fer tann norska rentan ætlandi eisini at hækka, skrivaði Aftenposten í gjár.

Samstundis avdúka tey seinastu tølini úr Týsklandi, at har er íløguhugurin ikki so stórur, sum serfrøðingar høvdu mett. Roknað varð við, at teir týsku íleggjararnir høvdu fingið betri vónir um framtíðina, men tølini vísa, at íløguhugurin er bara øktur eitt lítið vet og nógv minni enn væntað, skrivar DPA.

# Fær neyvan annan dóm enn deyðadóm



*Í hesum skottrygga búrinum skal Saddam Hussein sita undir rættarmálinum*
Mynd: Reuters

**Rættarmálið ímóti Saddam Hussein byrjaði í gjár, og úrslitið er næstan greitt frammanundan**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hevði Saddam Hussein verið ákærdur fyri øll tey brotsverk, sum hann sigst hava ábyrgdina av, hevði rættarmálið uttan iva vart fleiri ár. Tí hevur ákæruvaldið valt at reisa nakrar ávísar ákærur ímóti honum í vón um, at prógvini eru so sannførandi, at rættarmálið kann avgreiðast eftir stuttari tíð.

Tað er lítið, sum bendir á, at maðurin, sum sat við leiðsluni í Irak í samfull 24 ár, fær aðra revsing enn deyðarevsing, og tey flestu vænta, at hann verður hongdur. Tí høvdu flestu irakar tikið undir við, men uttan fyri Irak eru tað minni enn so øll, sum taka undir við einum slíkum dómi. Í flestu londum er deyðarevsing avtikin, og fleiri av londunum, sum hava hermenn í Irak, hava eisini gjørt vart við, at tey taka ikki undir við, at fyrrverandi forsetin verður tikin av døgum.

Teir iraksku dómararnir eru heldur ikki samdir. Herfyri segði rættarformaðurin, at hann fer ikki at skriva undir ein deyðadóm ímóti Saddam Hussein av teirri einføldu orsøk, at hann er ímóti deyðarevsing. Hann legði afturat, at fær hann valið ímillum starv sítt og deyðadómin, sigur hann starvið frá sær.

### Átta ákærur

Ákæruvaldið hevur sett sær fyri at prógva, at Saddam Hussein er sekur í minst átta brotsverkum ímóti irakska fólkinum og mannaættini.

Í fyrsta lagi er hann ákærdur fyri at hava givið trygdardeildunum boð um at skjóta 143 shiamuslimar í býnum Dujail í 1982 sum hevnd fyri, at shiamuslimar royndu at beina fyri honum.



*Saddan Hussein varð tikin í desember í 2003*
Mynd: Reuters

Í øðrum lagi er hann ákærdur fyri at hava givið boð um at myrða fleiri leiðandi limir í Baath-flokkinum. Tað hendi á einum fundi í 1979.

Tann triðja ákæran snýr seg um eitt hópdráp í tí kurdiska økinum har norðuri í landinum í 1983, tá 8.000 menn úr Barzaniættini vórðu burturfluttir og myrdir.

Saddam er eisini ákærdur fyri ágangin ímóti shiamuslimunum í 1974, tá fimm leiðandi shiamuslimar vórðu avrættaðir.

Í fimta lagi er hann ákærdur fyri tað sokallaða Anfal-álopið á kurdarnar í 1988. Her brúkti herurin evnafrøðilig vápn, og minst 180.000 kurdar lógu eftirá. Tann sætta ákæran snýr seg eisini um ágang ímóti kurdunum. Her er talan um hópmorðið í býnum Halabja í 1988, tá umleið 5.000 fólk doyðu av sinnops- og nervagassi.

Tann næstseinasta ákærdan er álopið á Kuwait í 1990, og í áttanda føri er Saddam ákærdur fyri at hava givið boð um at beina fyri umleið 300.000 shiamuslimum, eftir at hann hevði tapt Flógvakríggið í 1991.

# Wilma versnar

**Ódnin "Wilma" er nú flokkað sum ein av teimum ringastu og hevur kós ímóti Meksikanska Flógvanum og Florida**

VEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanararnir eru farnir at fyrireika seg til enn eina ódn. Hesaferð er tað "Wilma", sum longu hevur kravt minst tíggju mannalív á leiðini ígjøgnum Karibiska Havið.

Nú hevur hon sett kós ímóti Meksikanska Flógvanum og Florida, men á vegnum fer hon at bera við land á meksikanska Yucatan-nesinum og Kuba. Miðamerikonsku londini Honduras og Nikaragua fáa væntandi eisini sviðan av "Wilmu", og myndugleikarnir har fyrireika seg til tað ringasta. Hinvegin sleppa grannalondini El Salvador og Guatemala eftir øllum at døma snikkaleys hesaferð. Har hevur ein onnur ódn júst kravt meiri enn 1.000 mannalív.

Amerikanski ódnarstovnurin segði í gjár, at "Wilma" er longu vorðin ein av teimum ringastu ódnunum, og at hon má sigast at vera sera vandamikil. Veðurmenninir rokna við, at "Wilma" fer at bera við land har suðuri í Florida leygardagin. Tríggjar aðrar ódnir, "Dennis", "Katrina" og "Rita", hava longu herjað Florida higartil í ár.

"Wilma" er tann tólvta ódnin í ár, og so nógvar hava ódnirnar ikki verið síðani 1969. Teir tropisku stormarnir eru higartil 21 í tali, og tað er tað mesta síðani 1933. Vanliga verður roknað við, at tropiskar ódnir kunnu taka seg upp til umleið tann 1. desember.